VIÐMERKINGAR

# Opin spurningur til Føroya Landsstýri

**Jón Tyril**

**Ætlar landsstýrið at boða altjóðasamfelagnum frá, at føroyingar eru serstøk tjóð við sjálvsavgerðarrætti?**

Føroyingar eru ein tjóð (eitt serstakt fólk). Hesum ivast føroyingar ikki í, heldur ikki politiska andstøðan.

Til tjóðarhugtakið knýta seg ávís rættindi eins og til menniskjahugtakið mannarættindi. Í báðum førum eru hesi rættindi altjóðarættarliga staðfest, m.a. í samtyktum í Sameindu Tjóðum (ST).

Millum rættindi tjóðanna eru (sambært Gudmundi Alfredssyni í frágreiðingini til Føroya Landsstýri) m.a. staðfest, at:

Tjóðir hava altjóðarættarligt virkisføri, og tjóðir hava sjálvsavgerðarrætt. Tað merkir, at tjóðir hava rætt at samskifta við altjóða stovnar, eitt nú ST. Og tað merkir, at tjóðir hava rætt til sjálvar at avgera sína fólkarættarligu og statsrættarligu støðu. Í okkara føri kundu vit nýtt henda rættin til at verið samrunnin partur av DK, í frælsum felagsskapi við DK, ella at Føroyar loystu frá DK.

Nógv er skrivað um hesi viðurskifti og nevndu rættindi av fleiri altjóða viðurkendum serfrøðingum. Áðurnevnda frágreiðing er at finna í nýggja løgfrøðiliga ritinum „Føroyskt Lógarrit“ og á heimasíðuni www.fullveldi.fo/ undir tíðindi.

Í gjár ljóðaði so í ÚF, at løgmaður ætlaði ikki at leggja uppskotið um sjálvsavgerðarrætt og tjóðskap føroyinga fyri tingið. Hetta grundgevur hann við, at andstøðan sigur seg ikki vilja atkvøða fyri uppskotinum. Andstøðan sigur seg ikki atkvøða fyri, tí hetta málið og hesi viðurskifti eru so eyðsæð, og harnæst, tí eingin hevur sátt iva um okkara tjóðskap.

Men eg má viðganga, at sum vanligur leikmaður kann stundum vera ilt at fylgja við.

Er tað so eyðsæð, at vit eru tjóð við teimum rættindum, ið hoyra til, hví taka andstøðuflokkarnir so ikki undir við tí? Mannarættindi verða av flestu londum í vesturheiminum søgd at vera eyðsædd. Skulu londini vestanfyri so ikki atkvøða til tess at staðfesta tey, um tey verða løgd fyri á fundi í ST?

Tá andstøðan harafturat sigur, at eingin hevur sáað iva um, at vit eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti, so er hetta als ikki rætt.

Danski uttanríkismálaráðharrin skrivaði í brævi til Sameindu Tjóðir og løgmans hin 23. august 2000, at føroyingar hava „ingen kompetence til at optræde på det folkeretlige plan“. (Stutt eftir hetta varð eisini noktað løgmanni at hitta Nato aðalskrivaran.) Henda próvførslan hjá danska uttanríkismálaráðharranum byggjur á ta fortreyt, at føroyingar ikki eru tjóð, ikki hava sjálvsavgerðarrætt og ikki hava altjóðarættarligt virkisføri. Lítil ivi kann tískil vera í, at ivi av sonnum er sáddur um okkara støðu og rættindi sum tjóð _ og at hesin ivi er sendur víðari til ST.

Eg skal eisini leggja afturat, at tá landsstýrið sleit samráðingarnar við danir hin 26. oktober, stóð í tíðindaskrivinum frá landsstýrinum: „Danska stjórnin hevur eisini boðað frá, at hon heldur fast um, at hon ikki viðurkennir føroyingar sum eina tjóð. Forsætisráðharrin heldur fast um, at føroyingar og danir eru ein og sama tjóð og viðurkennur tí ikki, at Føroya fólk hevur sjálvsavgerðarrætt.“ Víðari stendur í skrivinum: „…Løgmaður fer eftir viðgerð í Uttanlandsnevnd løgtingsins at boða ST frá sjálvsavgerðarrætti føroyinga“, og aðrastaðni stendur … „tí hevur løgmaður handað stjórnini skjal um, at føroyingar eru tjóð. Hetta skjal verður eftir viðgerð í uttanlandsnevnd løgtingsins fráboðað altjóða samfelagnum.“

1. Havandi alt hetta í huga, hvussu ber tað tá til, at andstøðan førir fram, at eingin hevur sátt iva um okkara støðu sum tjóð?

2. Og hvussu ber tað til, tá andstøðan førir áðurnevnda fram, at Føroya Landsstýri ikki átalar hetta og leggur neyðug skjøl á borðið til tess at prógva tað, sum sagt varð í tíðindaskrivi hin 26. oktober?

3. Og er tað ikki ein vánalig grundgeving at siga, at uppskotið verður ikki lagt fyri tingið, tí at vissa ikki er fyri, at andstøðan tekur undir við tí? (Skuldi samtyktin um mannarættindi ikki verðið løgd fram fyri ST, tí at ávís limalond ikki tóku undir við henni?)

4. Er ognarrættur m.a. í undirgrundini ikki eisini tengdur tætt saman við sjálvsavgerðarrætti tjóðanna?

5. Er ikki júst spurningurin, hvørt vit eru tjóð ella ikki, eisini avgerandi fyri, um samráðingar við danir eru innanhýsis danskt mál ella mál við altjóða áhuga? Og er ikki júst hesin sami spurningur avgerandi fyri, hvørt vit kunnu krevja at hava eygleiðarar við til samráðingar ella ikki? Og er tað ikki júst hesin spurningurin, hvørt vit eru serstøk tjóð, sum er orsøkin til, at vit yvirhøvur hava heimastýri, og at vit fóru í samráðingar við danir á hesum sinni?

Og var tað ikki júst hetta, at vit eru tjóð við teimum rættindum, sum hoyra til, aðaltátturin í tí samstarvsskjali, sum allir tríggir samgonguflokkar skrivaðu undir, tá teir valdu at skipa stjórn?

Tað, sum kanska er mest umráðandi í øllum hesum, er, at Føroya Landsstýri sum umboð fyri Føroya fólk hevur boðað frá, at tað fer at senda altjóðasamfelagnum fráboðan um, at vit eru tjóð. Hetta er alneyðugt at gera, til tess at orðini hjá danska uttanríkismálaráðharranum og danska forsætismálaráðharranum um, at vit ikki eru føroyingar, men danir, ikki standa ósvarað.

Eg má siga, at tað undrar meg almikið, at Føroya Landsstýri og Føroya Løgting ikki taka henda spurning í størri álvara, og eg vóni at fáa svar upp á teir spurningar, eg her havi sett fram.

Fyri mær eru rættindi hjá eini tjóð mótvegis øðrum tjóðum at líkna við rættindi hjá einstaklingi millum einstaklingar, og tá Føroya Landsstýri ikki letur Føroya Løgting samtykkja okkara støðu og rættindi sum tjóð, so sýnir hetta eftir mínum tykki tvørrandi virðing fyri mannarættindum føroyinga í altjóða høpi.




# Rás Klaksvík

**Marita Matras, Klaksvík**

Tá eg hyggi út gjøgnum stovuvindeygað, síggi eg eina parabol. Tað órógvar meg ikki sum so, men tað er bara eitt gott dømi um, hvussu støðan er í Klaksvík.

Parabolir standa á mest sum hvørjum húsaveggi í býnum, á hjallum og í havum, og tað er als einki prýði í hesum parabolum, sum gerast alsamt fleiri í tali.

Hevði tað ikki verið eitt nógv betri hugskot, at vit høvdu eina kommunala skipan við fylgisveinasjónvarpi, eins og tey hava í Havn.

Tað hevði verið at givið borgarunum í býnum eina góða tænastu og hevði ivaleyst forðað fyri, at fólk, sum enn ikki hava fingið sær eina parabolskipan, fóru at seta parabolir á húsaveggin ella á hjallin.

# Í býin við Sosialinum

Í BÝIN

*Eirikur Lindenskov*

Vit eru farin undir ein nýggjan tátt áí Sosialinum í samband við teigin »Í býin«.

Fyri at gera teigin eitt sindur áhugaverdari, verður farið »í býin« kring alt landið, og síðani verður skrivað um, hvussu hetta roysndist – hvønn hósdag.

Á henda hátt sleppur lesarin at vitja tey støð, farast kann í  um vikuskiftið, og tá vit vilja hugna okkum annars um alt landið.

Greinarnar, sum verða skrivaðar, fara at snúgva seg um alt møguligt. Tað kann  verða reportasja fra einum matstað, vit hava roynt, ummæli av eini konsert, vit hava verið til, ella tað kunnu vera tíðindi um støð og tiltøk, sum vit kunnu royna um vikuskiftið.

Síðsta hósdag skrivaðu vit um, tá vit vóru inni á gólvinum hjá Café Natúr, og næsta hósdag kunnu tit lesa um, hvussu vitjanin á Hereford í Klaksvík royndist.

Hetta verður ummæli av upplivinigin sum heild, møguliga onkur kendur gestur er við hesuferð, hvør veit?



ÚT AT KOYRA

## Renault á Nissan verksmiðju



Renault, sum eiga 37 prosent av Nissan, eru farnir at framleiða Renault bilar á eini Nissan bilverksmiðju í Mexico. Ein Renault Kangoo við Nissan búmerkjum er á veg til Evropa.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

## Mazda 626



Ein nýggjur Mazda 626 stationvognur er komin á marknaðin í Japan. Bilurin er sera væl útgjørdur, og fæst við tveimum motorstøddum, 2.0 litur við 136 hk, og 2.5 l V6 við 200 hk.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Toyota á odda



Í nýggjastu TÜV Auto-Report, ið er almannakunngjørd í týska bilmagasininum Auto Bild, eru Toyota á odda, hvat viðvíkur kvaliteti, trygd og fyri at vera álítandi.

*Kelda: Toyota Danmark A/S*

# Aprilia SR50 Ditech

*– ein umhvørvisvinarligur skutari*

BILAR

*Magnus Gunnarsson*

Við Ditech modellinum kemur Aprilia á marknaðin við heilt nýggjari tøknifrøði, sum teir hava samstarvað við Orbital í Australia og Siemens í Týsklandi um, við tí endamáli at minka um brúki av brennievni og at dálkingin verður so lítil sum til ber.

**Beinleiðis innspræning**

Fyritøkurnar Orbital og Siemens hava saman við Aprilia, gjørt tað møguligt at tann mest framkomna tøknin, kann verða til taks á vanligum skutarum, og kann keypast til kappingarføran prís. Aprilia SR50 Ditech hevur vatnkøldan motor. Navnið Ditech stendur fyri (Direkt injection technology), so her er talan um elektroniskt stýrda beinleiðis innsprænging. Elektronikkurin fær sínar upplýsingar frá m.a. snúningstalunum á motorinum, og hitanum á vatninum.

**Lítil dálking**

Tað sermerkta við Aprilia SR50 Ditech, er at skutarin er sera umhvørvisvinarligur, við tað at oljunýtslan og dálkingin eru sera lág. Mongdin av skaðiligum evnum í útstoytinum er minkað við upp til 80 prosent, og brennievninýtslan er 1.9 litur fyri hvørjar 100 km, sum má sigast at vera sera gott.



*Tað sermerkta við Aprilia SR50 Ditech, er at skutarin er sera umhvørvisvinarligur, við tað at oljunýtslan og dálkingin eru sera lág*

aprilia

### Aprilia SR50 Ditech

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1 syl. 2-takt 50 cc |
| Kompressión: | 12,5:1 |
| Injector: | Automotive (EFI) type |
| Gearkassin: | Automatisk variator |
| Bremsur: | Skivur framman og aftan |
| Vekt: | 90 kg |
| Prísur: | kr. 24.498 |
| Søluumboð: | AD-IMPORT<br>N.Finsensgøta 12<br>FO-100 Tórshavn<br>Tlf. 32021 |

# Dodge Super 8 Hemi í Detroit

BILAR

*Magnus Gunnarsson*

Chrysler hava í fleiri ár slóða fyri, við at hava spennandi og avbjóðandi konseptbilar á bilaframsýningini í Detroit. Bilar sum Dodge Viper, Plymouth Prowler og Chrysler PT Cruiser, eru allir byrjaðir sum konseptbilar í Detriot.

**Nútímans bilur**

Í ár varð tað so hesin Dodge Super 8 Hemi, sum vakti miklan ans í Detroit. Bilurin ið er ein sportcoupé við fýra hurðum og panoramarúti framman, líkist einum amerikanara frá 50´unum. Hóast bilurin minnir um ein bil frá 50´unum er hann ein nútímans bilur við øllum tí sum hartil hoyrir. Enn er tó ongin avgerð tikin um hann verður framleiddur.

*Kelda: FDM / Motor*

